Aðalfundur hjá Akademikarafelag Føroya tann 22.4.2022 kl. 17 í Smæruni

Møtt: 17 limir møttu á fundi.

Skrá sambært viðtøkunum:

1. **Val av fundarstjóra og skrivara**

   Í uppskoti til fundarstjóra var Lovisa Glerfoss. Uppskotið bleiv samtykt.

   Í uppskoti til skrivara var Signhild Johannesen. Uppskotið bleiv samtykt.

   Fundarstjórin staðfesti, at aðalfundurin var lógliga innkallaður sambært viðtøkunum og tískil viðtøkuførur.

2**. Frágreiðing um virksemi felagsins í farna skeiði**

Formaðurin greiddi frá virksemi felagsins í farna skeiði.

Frágreiðing formansins verður viðløgd aðalfundarfrágreiðingini sum serstakt skjal.

3. **Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar**

Kassameistari legði fram grannskoðaðan roknskap, sum verður viðlagdur frágreiðing, sum serstakt skjal. Roknskapurin bleiv góðkendur av aðalfundinum.

4**. Ásetan av limagjaldi**

Nevndin skýtur upp at hækka limagjaldið við 10 kr. fyri limin í limafeløgunum um mánaðan frá 1. januar 2023

Inn kom eitt uppískoyti ella broytingaruppskot frá Arkitektafelagnum. Uppskotini blivu viðgjørd í tveimum.

1) Uppskotið frá nevndini um at hækkað limagjaldið frá 120,- til 130,- um mánaaðan bleiv viðtikið við greiðum meiriluta.

2) Uppískoyti frá arkitektafelagnum um at pensionistar gjalda 1/3 av limagjaldinum og nýggir limir somuleiðis 1/3 av limagjaldinum. Tað er viðkomandi limur, sum má skjalfesta, at treyir fyri niðurskurði í limagjaldi eru loknar. Uppskotið bleiv umrøtt. Broytingaruppskot bleiv lagt fram frá arkitektafelagnum um, at nevndin hjá AKF kannar spurningin um differentiera limagjald. Hetta bleiv viðtikið.

5. **Viðgerð av innkomnum málum, uppskotum og viðtøkubroytingum**
Uppskot hjáheft um at broyta § 3, 8 og 9 í viðtøkunum

Uppskot til broytingar í viðtøkum felagsins at viðera á aðalfundi 22. apríl 2022.

§ 3 stk. 5 og 6

Verandi orðing:
Stk. 5. Limafelagslimir,ið heilt ella munandi eru eigarar av privatum virki, og limafelagslimir,ið
vegna arbeiðsgevaran útinna leiðslurætt, har ið AKF hevur sáttmálaøki, kunnu eftir egnum ynski
verða frítiknir fyri verkfalsskyldu og rindan í verkfalsgrunn.
Stk. 6. Limafelagslimir sbrt. stk. 5 kunnu ikki, uttan mun til frítøku, vera nevndarlimir í AKF.

Uppskot til nýggja orðing:
Stk. 5. Limafelagslimir,ið heilt ella munandi eiga privat virki, og í tí hava arbeiðsgevaraskyldur ella útinna leiðslurætt, har ið AKF hevur sáttmálaøki, kunnu eftir egnum ynski verða frítiknir fyri verkfalsskyldu og at rinda í verkfalsgrunn.
Stk. 6. Limafelagslimir sbrt. stk. 5 kunnu ikki, um teir eru frítiknir fyri verkfalsskyldu og at rinda í verkfalsgrunn, ella um teir hava arbeiðsgevaraskyldur ella útinna leiðslurætt í egnum virki, har ið AKF hevur sáttmálaøki, vera nevndarlimir í AKF.

§8, stk. 3

Verandi orðing:
Stk.3. Aðalfundurin skal fráboðast í fjølmiðlunum 2 mánaðir frammanundan.

Uppskot til nýggja orðing:
Stk.3. Aðalfundurin skal fráboðast limafeløgunum og lýsast á heimasíðu felagsins 2 mánaðir frammanundan. Aðalfundurin skal fráboðast í fjølmiðlunum 14 dagar frammanundan, og áminning verður send limafeløgunum og løgd á heimasíðu felagsins.

§ 9 stk. 2

Verandi orðing:
Stk. 2. Lýsast skal til eykaaðalfundar í fjølmiðlunum seinast 8 dagar eftir avgerð í nevndini hjá AKF
ella móttøku av áheitan frá nevndunum í limafeløgunum. Fundurin skal lýsast við minst 8 daga
freist. Lýsingin skal nevna, hvørji mál eru á skránni.

Uppskot til nýggja orðing:
Stk. 2. Eykaaðalfundur skal fráboðast limafeløgunum og lýsast á heimasíðu felagsins og

fjølmiðlunum seinast 8 dagar eftir, at nevndin hjá AKF hevur tikið avgerð um hetta, ella áheitan frá nevndunum í limafeløgunum er móttikin. Fundurin skal lýsast við minst 8 daga freist. Lýsingin skal nevna, hvørji mál eru á skránni.

Uppskot um at broyta §3 var umrøtt nakað. Nevnt var, at problematikkurin snýr seg um, at fólk sum hava v tal kunnu vera í nevndum. Spurt varð inn til, hvussu sjálvstøðugtstarvandi sálarfrøðingar ávirkast av uppskotinum í sambandi við verkfall og var svarið, at verkføll verða lýst fyri hvørt øki sær tvs. at sjálvstøðugt starvandi sálarfrøðingar møguliga fara í verkfall í sambandi við samráðingar um sáttmálan millum Felagið Føroyskar Sálarfrøðingar og Heilsutrygd, men ikki tá samráðst verður um aðrar sáttmálar, sum sjálvstøðugtstarvandi sálarfrøðingar ikki eru fevndir av.

Allar viðtøkubroytingar blivu samstyktar við greiðum meiriluta.

6. **Fráboðan frá nevndunum í limafeløgunum um tilnevning av nevndarlimum og eykalimum í AKF (annaðhvørt ár)**

Í ár vóru tað Verkfrøðingafelagið og Arkitektafelagið sum skuldu fráboða tilnevning av nevndarlimum og eykalimum til nevndina hjá AKF.

Verkfrøðingafelagið tilnevndi Gunn Møller sum nevndarlim og Arni Petersen sum eykalim

Arkitektafelagið tilnevndi Robert Thomassen sum nevndarlim og Bárð í Baianstovu sum eykalim.

Kunnað var um nevndarlimir annars:

Fyri Magistarfelagið Páll Nolsøe sum nevndarlimur og Marjun Lutzen sum eykalimur.

Fyri Byggifrøðingar Anton Arge sum nevndarlimur og Helgi Johannesen sum eykalimur.

Fyri Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar Birita J. Lamhauge sum nevndarlimur og Gitte Klein sum eykalimur.

7. **Val av formanni og næstformanni fyri 2 ár (annaðhvørt ár)**

Formaðurin stendur fyri vali í ár. Páll Nolsøe bleiv sum spurdur, um hann tók við afturvali og játtaði hann hesum.

Umrøtt var annars, at skipanin við vali av nevndarlimum og forfólkum má endurskoðast, tá man kann koma í trupulleikar av, at t.d. sitandi formaður komandi ár ikki verður innstillaður til nevndina av egnum felag.

8. **Val av grannskoðara**

Boðað bleiv frá, at grannskoðararnir Annika Sølvará og Jákup Mørkøre taka við afturvali.

9**. Ymist**

Undir ymiskt bleiv umrøtt limakortið við limaágóðum. Ætlanin er at menna talgilt limakort. Eitt tilboð er komið, men varð tað mett ov kostnaðarmikið. Arbeitt verður víðari við málinum. Mælt var limunum til at hyggja inn á Starvsfelagið fyri at kunna seg um teirra limaágóðar.

Spurningur bleiv eisini reistur, hvørt kortið skal vera elektroniskt, arkitektafelagið hevur plastikkkort, sum verður endurnýggjað á hvørjum ári.

Umrøtt var aftur potentielt verkfall í relatión til samtyktu viðtøkubroyting av §3. Staðfest varð at verkføll verða lýst fyri hvør sítt sáttmálaøki.

Fundur var lokin kl. 18.30.